ALMENN SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA 2002-2003

1) Právskeið í føroyskum

Endamálið við skeiðinum er, at menna hegnið at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt og at økja fatanina av føroyskum máli og nýta tað í arbeiði, gerandislívi og til hægri lestur.
Skeiðið byrjar á *Føroyamálsdeildini* 16. september í einum flokki við undirvísing mánadag og hósdag, báðar dagar kl. 16.15-18.30.
-Fortreytir: Føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi.

Lærari: Lena Reinert

2) Právskeið í enskum

a) Skeið til Cambridge First Certificate in English
byrjar á *Føroyamálsdeildini* 12. september í einum flokki
við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.
-Fortreytir: Miðnámsstigi A/B ella samsvarandi kunnleiki, eitt nú Cambridge FCE-royndin, førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English
byrjar á *Føroya Landsbókasavni* 11. september í einum flokki
við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið "Advanced English," málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Právtøkurnar verða í mai/juni 2003.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **23. august 2002.** Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.
Tilmeldingargjaldið er 650 kr.
Fyri právtøku í føroyskum gjalda næmingar 350 kr.
Fyri právtøku í First Certificate gjalda næmingar 700 kr.
og fyri právtøku í Proficiency 900 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 31 53 02
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

Sosialurin
-tað loysir seg

Pedagogar

til Bústovnin og Sambýlini í Runavík

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og sambýlunum í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja til setan 1. aug. 2002 ella eftir nærri avtalu.

Størvini verða sett antin sum tænastumannastørv ella sum sáttmálasett, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, fyri tænastumenn lønt stigini 24–31 eftir lønartalvu pr. 01.03.02 ella fyri sáttmálasett lønt stigini 11–16.

Á Bústovninum á Rúnarvegi búgva seks menningartarnað fólk og á Sambýlinum á Rúnarvegi koma eisini 6 lættari menningartarnað fólk at búgva. Harumframt hoyrir Sambýlið á Líknagøtu 1 eisini til stovnin. Uppgávan hjá starvsfólkunum, sum nú verður søkt eftir, verður at hjálpa og vegleiða íbúgvarnar í Sambýlinum á Rúnarvegi í øllum tí, sum tey hava tørv á. Tit fáa við tykkara pedagogisku vitan ábyrgdina av at menna íbúgvarnar m.a. til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan.

Arbeiði á einum slíkum sambýli krevur áræði og fleksibilitet og at tú setur teg føran fyri at menna íbúgvarnar til bæði innanhýsis viðurskiftir og at klára seg úti í samfelagnum.

Vit vilja at tú saman við okkum vil innrætta og skapa sambýlið til eitt heim, soleiðis at vit øll trívast og á ein pedagogiskan hátt tryggjar, at okkara menningarmøguleikar koma í fyrstu rekkju, og finna útav saman, hvussu innihaldið í dagligdegnum skal virka.
Vit vilja eisini, at tú skal hava samskifti við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga.

Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at kunna fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Ert tú áhugaður í at uppbyggja og seta í verk og ganga nýggjar leiðir, so send eina umsókn við avriti av prógvum innan 24.07.2002. Eru spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til leiðaran á tlf. 448424.

Umsóknir skulu stílast til:
Sambýlið á Rúnarvegi
Att.: leiðarin
Rúnarvegur 3
FO-620 Runavík

Stongt vegna summarfrí

Vegna summarfrí, verður kommunuskrivstovan stongd frá 22. juli - 09. august 2002.

Um átrokandi ørindi eru í hesum tíðarskeiði ber til at ringja á tlf. 266386 millum kl. 10.00-12.00.

Nes kommuna

Starv á Almannastovuni

Sosialráðgevi

Eitt starv sum avloysari fyri sosialráðgeva við fyribils tænastu á økisdeildini í Klaksvík er leyst at seta sum skjótast og inntil 28.02.03.

Arbeiðsuppgávur
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært forsorgarlógini
- ráðgeva barnaverndarnevndum
- seta í verk fyriskipanir smb. barnaforsorgarlógini í samstarvi við barnaverndarnevndirnar
- gera tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir
- annað.

Útbúgvingarkrøv og royndir
- sosialráðgevaútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga.

Um deildina
Arbeiðsøkið hjá økisdeildini er ráðgeving og vegleiðing í persónligum og forsorgarligum spurningum, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum smb. forsorgar- og barnaforsorgarlógunum.

Á deildini arbeiða 5 fólk.

Lønar- og setanarviðurskifti
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið - sosialráðgevar eru løntir í bólki 5.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Albin Johannessen, deildarleiðara á tlf. 457240.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 24.07.02.

Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá mánadegi 15. juli 2002. Opið verður aftur mánadagin 05. august 2002.

Bókhaldsvirkið RannTeld

Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 15. juli 2002 til 5. august 2002.

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelagid@kallnet.fo

Tormóður Djurhuus, adv. — Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. — Jógvan E. Ellefsen, adv.
Ingi Højgaard, adv — Anna Dam, adv.

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Ford Fiesta XR2 L, sportmodel, frá 7/90 til søluvi. Við sóltaki og hevur 104 HK. Koyrt 115.000 km, nýsýnaður og í góðum standi. Hevur sportfelgur og harafturat 4 heilársdekk við felgum, sum eru 9 mán. gomul.
Tlf. 312292/340033

MAZDA 323 1.6i GT
árg. 86, svartur, sýnaður jan. 02, bíliga til søluvi.
Tlf. 224030

ÚTSTOYT
til Nissan Sunny 1.6 N 13. árg. 86 ynskist til keyps.
Tlf. 256049

TIL SØLU
Ein Nissan Cabstar til søluvi. Bilurin hevur krana og er frá 1992 - er í góðum standi.
Tlf. 375139/220739

NISSAN PRIMERA SE
árg. 98, koyrt 46.000 km, leðursetur, alt elektriskt, sportfelgur. 4 vetrardekk á felgum fylgja við. Prísuppskot 148.000. Ringi eftir kl. 18.
Tlf. 332006

TIL SØLU
Toyota Camry 20 GLI, árg 87, elrútar, ár con. og powerstýring til søluvi. Koyrir væl. Prísuppskot 12.000 kr.
Tlf. 421411

TIL SØLU
Nýsýnaður Mazda 929 2,21, árg. 89
Tlf. 218171

SPORTFELGUR TIL SØLU
Orginalar Ford 15" alufelgur við dekkum til søluvi fyri 2500 kr. Tvey av dekkunum eru rættuliga góð.
Tlf. 254297

TIL SØLU
Opel Astra diesel, árg. 99, við skaða, til søluvi.
Tlf. 316005 - 220710

TIL SØLU
Baklúka til Ford Fiesta, árg. 88.
Tlf. 316005 ella 220710

TIL SØLU
Nissan King Cab 2.5D 4x4, árg. sept. 96, 4 píkadekk á felgum fylgja við. Rustviðgjørd. Sær út sum nýggjur. Til søluvi um hóskandi boð fæst.
Tlf. 371386

TIL SØLU
Honda Civic 1,4 90 hk, klárar 15-18 km/liturin, árg. 88, nýsýnaður, nýlakeraður og við fylgir eyka sett av felgum.
Tlf. 441801 - 441800 - 223216

TOYOTA CORLLA 1,3
Árg. 92, koyrt 113.000 km, til søluvi.
Tlf. 221479 / 319927

VOLVO 244
árg. 87, koyrt 150.000 km, sýnaður 16/5-02, til søluvi.
Tlf. 318332

BMW 525 TDs
árg. 95, til søluvi. Hevur koyrt 140.000 km. Boð undir 150.000 kr. ongan áhuga. Sýnaður í 2001.
Tlf. 373585

CITROEN ZX
Citroen ZX, 1,9 diesel, árg. 92. 5 hurðar. Nýsýnaður.
Tlf. 315594

NISSAN SUNNY 1.7 D
SLX, árg. 12/89, til søluvi. Ymisk eykaútgerð fylgir við.
Tlf. 215170

FORD ESCORT
árg. 87, til søluvi (bíliga), krevur ábøtur men koyrir. (Hevur plátur).
Tlf. 223403 ella 310566

VW GOLF 19 DIESEL
Árg. 94, hvítur við sóltaki, í sera góðum standi, til søluvi.
Tlf. 445041 - 258341

MAZDA MPU 2,5 TDi
árg. 12/98, 7 setur, koyrt 71.000 km, til søluvi.
Tlf. 444767

DAIHATSU APPLAUSE Xi
til søluvi. Árg. 95, 80.000 km, bláur. Sí myndir av bilinum á www.bil.fo
Tlf. 317564

FORD ESCORT
til søluvi. Árg. 99, silvurlittur, 25.000 km, hevur sleipikrók. Fýra felgur við píkadekkum fylgja við. Er sum nýggjur.
Tlf. 253352

MAZDA 323
árg. 85 til søluvi. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 422361 ella 263862, Jóhanna

TOYOTA CARINA 1,6
frá 87, bíliga til søluvi.
Tlf. 262934 ella 311688

VW GOLF 4 1,9 DIESEL
til søluvi vegna flyting. Hevur sóltak, 5 hurðar, eykasett av felgum við heilársdekkum fylgir við.
Tlf. 224290 / 456076, e. kl. 18

TOYOTA COROLLA
árg. 87, uttan plátur. Bíliga til søluvi.
Tlf. 320630

DAIHATSU ROCKY EX
Turbo, árg. 85 til søluvi fyri 7.000 kr.
Tlf. 421492 ella 220004

TOYOTA COROLLA 1.3
Bláur Toyota Corolla 1.3 XLI, stw, hevur koyrt 145.000 km, árg. 07/92, í góðum standi.
Tlf. 222900

BILUR TIL SØLU
Nýsýnaður Citroen BX bíliga til søluvi.
Tlf. 217115 ella 261427

BMW 324 TD
árg. 90, svartur, myrkar rútar, el-spegl, el-rútar, el-sóltak, alufelgur og kavadekk á felgum, sær sera gott út.
Tlf. 224581

EYKALUTIR TIL SØLU
Toyota Corolla 1.3, árg. 89, toppstykki við øllum (kab) innsprøning, óbrúkt, kølivatnspumpa, rotorur.
Tlf. 318570

VW GOLF C
Árg. 86, til søluvi sum eykalutir fyri 2.500 kr.
Tlf. 457564 ella 251617

TIL SØLU
Mazda 626, árg. 87, koyrt 180.000 km., sýnaður 2001, ongan x - møguliga gamal bilur kann ganga inn í keypi. Prísin kunnu vit tosa um.
Tlf. 228347

TIL SØLU
Daihatsu Charade G 100, árg. 89, koyrt 118.000 km., sýnaður 3/02, ongan x - møguliga gamal bilur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 228347

Amboð

ALUMINIUM SKJÓTISTIGI
uml. 10 metrar langur, til søluvi fyri 600 kr.
Tlf. 319787 ella 219787

TIL SØLU
Tielbürger sláimaskina í góðum standi til søluvi.
Tlf. 223527

HØVIL OG AVRÆTTARI
Lítið brúktur kombineraður høvil og avrættari til søluvi.
Tlf. 250646 ella 333046

TIL SØLU
Ein Plymo plenuklippari. Við fylgir eyka knívur, sera væl røktur, til søluvi fyri 1.000 kr.
Tlf. 422027

BORÐSAG
220/380 V 2.2 kw, 20 m tekniskur kápil, 36 mm hart metal klinga, til søluvi fyri 2.900 kr.
Tlf. 0045 20944405 ella 264934

Arbeiði

FÓLK SØKIST
Álitandi fólk søkist skjótast.Fish&Chips
Tlf. 317405 ella 320220

ARBEIÐ YNSKIST
Eg eri ein 21 ára gomul genta, ið ynskir eitt vaskiarbeiði 1-2 ferðir um vikuna (helst um vikuskiftið).
Tlf. 220159, e. kl. 18

ARBEIÐI YNSKIST
14 ára gamal drongur ynskir fyrifallandi arbeiði í summarfrítíðini.
Tlf. 318103

BARNAGENTA
Eg eri ein 12 ára gomul genta, ið fegin vil ansa eftir børnum í øllum aldri (tó helst millum 2 og 6 ár). Áhugaði biðjast ringja á
tlf. 318332, Jóna

ARBEIÐI SØKIST
14 ára gomul genta søkir arbeiði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 315888 / 254737

EG ÁTAKI MÆR
vaskiarbeiði, t.d. tvær ferðir um vikuna. Alt hevur áhuga.
Tlf. 250318 ella 224412

AU-PAIR TIL ÍSLANDS
Familja við 3 børnum ynskir at fáa unga gentu til at passa Finnur (1 ár) og Markus (4 ár) ein part av degnum. Tey hava íbúð í kjallaranum sum er fyri au-pair gentuna.
Tlf. 00354-8212047 (er føroysk)

Barnaansing

NEYÐARRÓP!
Er nakar, sum kann passa dóttir mína uppá 3 ár, frá kl. 8 og 16 gerandisdagar?
Tlf. 220430

ER TAÐ
nakar, sum kann passa ein 8 ára gamlan drong, frá kl. 11.30-17.00, tá ið skúlarnir byrja aftur. Helst í Vesturbýnum.
Tlf. 222900

HALLÓ!
Eg eiti Marita og eri 1/2 ára gomul, um tú kundi hugsa tær at ansa eftir mær gerandisdagar, frá 19. august, so vinarliga ring
tlf. 321636 ella 212570

Barnaútgerð

TIL SØLU
Britax bilbarnastólur, 0-13 kg, til søluvi. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 317578 / 258711

BARNAVOGNUR
Bláur Brio barnavognur til søluvi. Bert nýttur til eitt barn.
Tlf. 317578 / 258711

TIL SØLU
Myrkabláur Brio koyristólur, regnslag og føroyskur posi til søluvi fyri 1.200 kr.
Tlf. 311521

TIL SØLU
Myrkabláur Brio barnavognur og myrkablá babylift til søluvi fyri 2.000 kr.
Tlf. 424224

BARNAVOGNUR
Ein lítið brúktur barnavognur við lyft frá Skemmuni, sum nýggjur, til søluvi fyri 1500 kr. Nýprísur 2750 kr.
Tlf. 254930

BRIO
Brio koyristólur til søluvi, gráur við svørtum stelli, 500 kr.
Tlf. 257438

VÆLHILDIN COMBIVOGNUR
við babylift og regnslagi til søluvi fyri 1.700 kr.
Tlf. 455108

PUSLIBORÐ
at klappa saman ynskist til keyps.
Tlf. 317504

TIL SØLU
Bláur Simo koyristólur, 1 ára gamal, til søluvi vegna flyting fyri 2.200 kr. Keypsprísur 3.600 kr.
Tlf. 313858 - 215858

TIL SØLU
Ein grønur Brio barnavognur, 1.000 kr., og ein bláur Bertini koyristólur, sum kann venda við øllum fýra hjólunum, 1.800 kr.
Tlf. 262100 - 314759

Bátaútgerð

TIL SØLU
4 alminiumskassar sum taka 500 kg. hvør til søluvi um hóskandi boð fæst. Best eftir kl. 18.
Tlf. 282722

BÁTAMOTORUR
(BMW 5 cyl. 111 KW) við góðum geari til søluvi. Motorur krevur umvæling.
Telefon: 214863

YNSKIST
Ein bátavognur ynskist tl keyps. Ring á
Tlf. 214842

EYKALUTIR TIL ARONA 30 HK
Ein motorur og nakað av nýggjum eykalutum til søluvi.
Telefon 313197

TIL SØLU
Bayliner speedbátur 24,60 føtur, til søluvi um hóskandi boð fæst. Hevur 256 hk Ome Copra motor, ferð uml. 40 míl.
Tlf. 451091

BÁTUR TIL SØLU
Quicksilver Timonier 560 við Mariner F60 (60 HK 4-takts).
Bátatænastan SPF, tlf. 311735

BÁTAMOTORUR
Volvo Penta AD 41 (200 HK), í góðum standi.
Bátatænastan SPF, tlf. 311735

7-MANNAFAR
Eitt føroyskt, frambygt 7-mannafar við 36 HK Volvo Penta motori til søluvi fyri 2.700 kr.
Tlf. 310286, e. kl. 19

YNSKIST
Seksæringur ynskist til keyps við fiskiloyvi. Prísuppskot: 100.000 kr.
Tlf. 441675 ella 256914

7-MANNAFAR ÚR TRÆI
til søluvi. 2 kistur til leysamotorar. 2 25 HK Suzuki motorar fylgja við. Bátavognur kann møguliga fylgja við.
Tlf. 441964 ella 228447

Bingo

BINGO
Gott bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 15/7 kl. 19. Gávukort til eina og tvær rekkir og fulla plátu. Á lutaseðlinum 2x1.000 og 3 ferðir 500 kr.
Asma- og allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Pállstovu mánakvøldið 15. juli kl. 19. Gávukort til 1 og 2 rekkjur og til fulla plátu. Á lutaseðlinum 2 x 1000 kr. og 3. ferðir 500 kr.
Astma- og Allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Eydnuni sunnudagin 14. juli kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli 2.000 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag

TVØROYRAR KLUBBI
Bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórskvøldið 11. juli kl. 19.30.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 11. juli kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli ein hjólbora full av mati. 15 plátur 100 kr. Millumspøl. Eyka spæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

Burturm. /funnið

MOTOROLA
Hevur nakar funnið mína silvurgráu fartelefon, sum eg misti á jóansøku í Vági.
Ringi tlf. 252686 Sára

HJÁLP!
Tann, sum veit um ella hevur tikið mína súkklu, sum stóð uttan fyri Landssjúkrahúsið meðan bálið var í Sandágerði, verður biðin um at seta hana aftur ella ringja
Tlf. 315352, Rannvá

BURTURMIST Á JÓANSØKU
Ein Nokia fartelefon burturmist í Vági leygardagin 29.6. veit nakar um hana, vinarliga ring
á tlf. 255363-266169

TANN SUM TÓK
fartelefon mína í Marinargøtu 28 fríggjakvøldið 21. juni, verður biðin um at koma aftur við henni, tí systir mín eigur hana.
Tlf. 333399, Vivi

BURTURMIST
Tú, ið av misgáum hevur tikið ein svartan fjállræven ryggsekk við einum svørtum Nike jakka í á jóansøkukonsertini 27. juni, verður vinarliga biðin at ringja tlf. 223235 ella 263011. Eg kundi hugsað mær at fingið ryggsekkin aftur.
Tlf. 263011

HÚS ELLA ÍBÚÐ SØKIST
Ein friðarligur, 22 ára gamal drongur søkir hús ella íbúð til leigu í Klaksvík.
Tlf. 261663

NOKIA 3310
Hevur nakar funnið eina fartelefon, við stjørnu á baksíðuni, á Klaksvíksvegi, vinarliga ring
Tlf. 451183, Linda

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki